Almanna- og heilsumálaráðið søkir løgfrøðing

# Okkara paragraffir eru turrisligar...



## ...men tær hava stóran týdning fyri fólk

Lógir og reglur á almanna- og heilsuøkinum eru altíð á breddanum. Tí hesar lógir og reglur hava stóran og beinleiðis týdning fyri nógv fólk í okkara samfelag. Ein væl fyrireikað lóg gevur fólki eitt betri lív. Ein illa fyrireikað lóg ger tað øvuta.

Tí er tað ein stór avbjóðing at vera løgfrøðingur í almanna- og heilsuráðnum.

Teir eru tríggir í løtuni, og vit sóknast eftir einum afturat.

Tann, vit sóknast eftir, skal bæði duga at samstarva og arbeiða sjálvstøðugt. Viðkomandi arbeiðsroyndir eru eisini ein fyrimunur.

Fyri framman eru stórar uppgávur. Til dømis er nýggj føroysk forsorgarlóg ávegis, nýggj psykiatrilóg skal smíðast, og leigulóg skal tilevnast fyri fyrstu ferð í Føroyum.

Dagligar uppgávur annars eru m.a. í samstarvi við hinar løgfrøðingarnar at tilevna uppskot til lógir og kunngerðir, at tulka viðkomandi reglur og svara fyrispurningum úr løgtinginum.

Arbeiðið er avbjóðandi, tað hevur stóran týdning fyri nógv fólk í okkara samfelag, og tað gevur tær góðar møguleikar fyri førleikamenning.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelagið. Setanin fevnir um Almanna- og heilsumálaráðið og stovnar undir tí, umframt um Løgmansskrivstovuna og onnur stjórnarráð.

Umsókn við avriti av prógvum o.ø. skal sendast til:

Almanna- og heilsumálaráðið
Eirargarður 2
FO 100 Tórshavn.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 11. apríl 2005. Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Eyðun Mohr Hansen, deildarstjóra, tlf. 30 40 50 ella teldupost: ahr@ahr.fo.

Meira fæst at vita um Almanna- og heilsumálaráðið við at hyggja á www.ahr.fo

**Almanna- og heilsumálaráðið**
Eirargarður 2, FO-100 Tórshavn, Tel 30 40 50, Fax 35 40 45,
ahr@ahr.fo, www.ahr.fo

www.sansir.fo


*ODDER barnavogvur*
*Ikki bara til prinsessir*



Barnavogn við lift
2 madrassir
hardboks tasku
flugunet og regnskjól

*Alt samlað fyri*
**kr. 8.299,-**

ODDER

B&B ... eitt sindur betri

Baby & Barnaútgerð · Niels Finsensgøta 18 · Tórshavn · Tel. 315 101



**KONSERT & DISKOTEK!**
**PARADOX & DJ SWITCH**
**Í HØLLINI Á HÁLSI · 2. PÁSKADAG**
(mánakvøldið 28. mars)
**kl. 23.00 - 03.30**
Atgongumerki á kr. 100,- kunnu keypast við dyrnar!
KYNDIL TÓRSHAVN
Sosialurin



Sosialurin
www.sosialurin.fo



# MOMO

ella løgna søgan um tíðartjóvarnar og barnið,
sum fekk menniskjunum ta stolnu tíðina aftur



S k nĆqi gpl_p qnÎj_ tgr qmjcgåggß 0, nĆqi_b_e ij, /7
Atgongumerki á kr. 100,- fáast á Kunningarstovuni og við dyrnar ein tíma undan sýning

TJÓÐPALLUR FØROYA